# Strongurin slitnaði

Bólkurin Blív var næstan forfylgdur av óeydnu leygarkvøldið. Fyrst hevði sangarin gjørt av við røddina hjá sær undir drúgvu venjingunum áðrenn kappingina, og í fyrsta sanginum sleit gittarspælarin ein strong.

Og so var einki at gera uttan at steðga framførsluni nakrar minuttir, meðan Høgni Kragesteen lá flatur og skifti strongin. Tað tók eina løtu og var sjálvsagt óheppið fyri framførsluna, men teir fótaðu sær aftur og spældu víðari.



*Høgni Kragesteen skitir strong, meðan tøkningurin Jóhannus Steingrund gevur eina hjálpandi hond*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# SvF-stjórin á gátt



Stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, var til seinasta undanumfarið í Prixnum leygarkvøldið.

Sjónvarp Føroya er saman við Norðurlandahúsinum, FUT og Útvarpinum fyriskipari av stóra tiltakinum, og Sjónvarpið ger eisini sendingar frá undanumførunum.

# Nógv spent foreldur



*Signari á Brúnni dámdi væl framførsluna hjá Gestum, har sonur hansara spælir trummur*

Tað eru ikki bara ungfólk, sum eru til Prix-tiltøkini í Fuglafirði. Eisini tilkomin fólk koma á gátt, og summi hava serligan áhuga fyri onkrum bólki.

Leygarkvøldið vóru nógv spent foreldur og fylgdu avrikinum hjá synum teirra. Ein teirra var Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýris- og løgtingsmaður, og honum dámdi væl framførsluna hjá bólkinum Gestir, har sonur hansara, Jógvan Andrias, spælir trummur.

– Hatta er ikki tónleikastílurin, sum eg lurti mest eftir, men mær dámdi teir væl. Eg helt, at tað hekk væl saman hjá teimum, og tað var væl spælt, segði hann, tá Gestir høvdu verið á pallinum.

– Eg var sjálvur ein poppari sum ungur. Eg spældi gittar, men vit spældu ikki so væl, sum hesir gera. Umstøðurnar eru eisini nakrar heilt aðrar nú. Størsta frambrotið hjá okkum var, at vit fingu eitt gittarforsterkara og ekkó.



*Sálarfrøðingurin Heri Kragesteen og konan Katrin fylgdu soninum Høgna, sum spælir í Blív*

## Onnur vóru spent

Sálarfrøðingurin Heri Kragesteen og konan Katrin Petersen vóru eisini komin úr høvuðsstaðnum at lurta eftir soninum Høgna, sum spældi gittar í bólkinum Blív.

Tónleikastjórin Í Útvarpinum, Ove Olsen, hevði tveir synir við í hesum sama bólki – Líggjas og Ólav. Líggjas er eisini sangari í bólkinum Déjá Vu, sum hevur vunnið sær pláss í finaluni.

Og tónleikalærarin Jónleif Jensen var í Fuglafirði og fylgdi 14 ára gamla soninum Búgva, sum spældir trummur í bólkinum Jam.

# Naknir mans á pallinum



Framførslan hjá Hatespeech var villasta korterið, sum hevur verið í Prixnum higartil. Tað var ikki bara tað, at bólkurin á pallinum var í rætta essinum. Fólkini í salinum vóru á gosi..

Tveir mans var so kátir, at teir lótu seg úr meginpartin av klæðunum og fóru upp á pallin. Síðani tveittu teir seg út av pallinum og niður millum fólki har frammi.

Hetta fekk aðrar áhoyrarar at royna seg hesum, tey kalla »stagediving«, men hini fólkini lótu klæðini verða á kroppinum.

# Røddin hjá Ólavi reyk

Sangarin í bólkinum Blív, Ólavur Olsen, hevði tað einki serligt, tá ið hann skuldi á pallin leygarkvøldið, og hýrurin var heldur ikki tann besti aftaná framførsluna.

Nógva venjingin undan kappingini hevði gjørt, at røddin var rokin. Hann var hásur og hevði lítla orku at syngja.

– Vit vandu hósdagin og allan fríggjadagin, og tað gjørdi av við røddina hjá mær. Eg kundi kanska havt hugsað um tað og spart meg eitt sindur, men tað er ringt at venja uttan sangara, segði Ólavur.

– Røddin sveik mest, meðan eg var á pallinum, og eg noyddist at broyta nógv av løgunum, tí eg hevði ikki luft til at syngja, sum eg skuldi.

Ólavur Olsen gongur á konservatorii í Århus, og hann spælir eisini í bólkinum Take Off, sum í hesum døgum er í studio, har teir taka eina fløgu upp, sum kemur út í Føroyum í vár.



ítróttur

Nr. 48 • týsdagur • 11. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hatta var ikki hondbóltur

**Venjararnir hjá bæði VÍF og Kyndli harmast støðuna, sum tók seg upp seinastu løtuna av dystinum sunnudagin, men hóast alt eru teir fegnir um, at tað spældi somikið væl av, sum tað gjørdi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Tað var ikki tosið um hondbóltsspælið, sum stóð ovast á breddanum, tá dysturin millum mansliðini hjá Kyndli og VÍF var av sunnudagin.

Heldur var tað hendingin stutt fyri dystarlok, sum var til umrøðu. Ein hending, har bæði leikarar og áskoðarar sóu veipa runt á vøllinum, og atburðurin var í øllum førum av slíkum slag, sum als ikki hoyrir heima á einum ítróttarvølli.

## Burtur úr ongum

Upprunin til hendingina var annars av tí meira óskylduga slagnum. Daniel Rápa royndi at bróta ígjøgnum, og varð heldur harðliga tikin av Kyndils-verjuni, og sum rætt var, so bríkslaðu dómararnir fyri trimum metrum. Ivaleyst var ætlanin eisini at geva Høgna Klein, sum var maðurin aftan fyri harðligu taklingina, tveir fingrar, men so langt komu teir ongantíð.

Áðrenn nakran vardi, var alt í høllini á gosi. Sum vera man vóru menn heitir, og tá rok fyrst var komið í fylgið, var eingin vegur aftur. Skiftisleikarar komu rennandi inn av beinkinum øðrumegin. Ein teirra lá brádliga eftirá, og onkur illur Kyndils-áskoðari, sum helt seg hava sæð, hvat fór fram, leitaði sær eisini inn á vøllin.

Uttan iva kundu dómararnir uttan stórvegis hóvasták byrja at slongt reyð kort til høgru og vinstru, men tíbetur fyri komandi dystirnar hendi hetta tó ikki. Tað tók tó sína tíð, áðrenn alt var ruddað upp. Fýra mans vórðu riknir av vøllinum – harav ein við beinleiðis reyðum – og loksins kundu leikararnir so avgreiða seinasta hálva minuttin ella so.

*- Hví allir hinir menninir brádliga eru á vøllinum, skal tú ikki spyrja meg um, helt Ingi Olsen eftir dystin*

## Eingin frágreiðing

Tá vit fingu orðið á teir báðar venjararnar, Inga Olsen og Jakob Jónsson, dugdi hvørgin av teimum at siga, akkurát hvat tað var, sum gekk fyri seg.

- Upprunin til alt rokið mundi vera harðliga verjuspælið, helt Ingi Olsen.

- Daniel verður tikin, og tað var so ikki hondbóltslig endamál, sum lógu aftan fyri hetta, men tann hendingin kostaði so eisini ta útvísingina, sum tað átti. Hví allir hinir menninir brádliga eru á vøllinum, skal tú ikki spyrja meg um. Har var brádliga eitt øgiligt rót, har menn komu bæði av skiftis- og áskoðarabeinkinum, og tað er so ikki nakað, sum hoyrir heima nakrastaðni, heldur VÍF-venjarin.

Tað, sum kanska serliga skapti øði í hjá Kyndli mundi vera, at Rúni Mohr brádliga lá flatur á vøllinum. Hann var annars sjálvur komin rennandi inn av beinkinum, men longur enn miðjan veg kom hann ongantíð. Sambært Kyndils-áskoðarum tí Piti Negru hevði steðga honum sera effektivt.

Um hetta segði Ingi, at hann ikki hevði sæð tilburðin sjálvur, og at hann tí ikki kundi siga nakað her og nú.

- Tað ljóðar í øllum førum ikki gott, um tað er so, sum tað varð ført fram, men sum sagt, so kann eg ikki siga nakað, fyrr enn eg havi sæð tilburðin. Vit ætla okkum tó at hyggja at hendingini á sjónbandi, og so taka vit eina støðu út frá tí, sigur VÍF-venjarin at enda.

## Endaði væl

Kyndils-venjarin, Jakob Jónsson, var ikki sjálvur partur av rokinum, og hann fegnast einamest um, at alt hóast alt spældi somikið væl av.

- Eg síggi, hvat hendir við Rúna, men annars dugi eg ikki at siga, hví alt hatta fólkið knappliga var á vøllinum, so tað nyttar ikki at spyrja meg, hvat hendi. Einasta, sum eg veit, er, at hendingin byrjaði, tá Daniel varð takladur, og so var alt á gosi.

- Nú eftir dystin gleðist eg einamest um, at tað spældi somikið væl av, sum tað gjørdi. Dómararnir handlaðu eftir mínum tykki rætt, soleiðis at tað slapst enn meira øsing, og millum leikararnar var eingin illstøða aftaná. Allir mundu ásanna, at hetta ikki var nakað at vera errin av, og vit góvu so hvørjum øðrum hondina eftir dystin.

- Eisini eri eg fegin um, at Ingi og eg fingu tosað um tilburðin eftir dystin. Vestmenningar fara nú sjálvir at hyggja at tilburðinum, og so taka teir eina støðu í málinum, men frá okkara síðu er málið avgreitt. Vit fingu tey bæði stigini fyri dystin, og tað var fyrst og fremst tað, sum tað ráddi um fyri okkara viðkomandi, helt Kyndils-venjarin at enda.



*- Dómararnir handlaðu eftir mínum tykki rætt, soleiðis at tað slapst enn meira øsing, og millum leikararnar var eingin illstøða aftaná, segði Jakob Jónsson*